# Projektleiðarar og forritarar til Elektron

**Nógva ferðin í samfelagnum setur okkum stór krøv. Spennandi krøv. Tí økist og mennist eisini virksemið hjá P/F Elektron skjótt. Og her er tað, at vit hava brúk fyri tær sum projektleiðara ella forritara. Ovmikið er at gera, so vit ynskja at seta fleiri fólk í starv á báðum økjum.**

Vit raðfesta trivnaðin høgt. Her skal starvsfólkið trívast; fáa hóskandi avbjóðingar og hava møguleikan at menna seg fakliga eins og persónliga. Vit vilja eisini, at starvsfólkið er eyðkent fyri sín eldhuga, ábyrgdarsemi og hugin at vera til tænastu.

## PROJEKTLEIÐARAR

Arbeiða við at menna ymsu skipaninar saman við okkara dugnaligu starvsfólkum á Menningardeildini. Vit síggja fyri okkum, at tú ert ein sjálvstøðugur persónur, sum hugsar í loysnum, ert nærlagdur og málsøkin. Eisini er samstarv ein av tínum dygdum, eins og samskifti er tað í bæði skrivt og talu.

## WEB/.NET & HOST- FORRITARAR

Fara at fáa avbjóðandi og fjølbroyttar uppgávur í tí livandi og góða umhvørvinum á Menningardeildini, har 25 fólk starvast. Deildin veitir skipanir og tænastur til føroysku peningastovnarnar og almennar stovnar.

Vilt tú verða Web/.Net forritari hjá okkum, er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir við til dømis .NET, C#, VB, SQL, XML, AJAX, JAVA, Sharepoint og Web-tænastur.
Er tú hinvegin Host forritari, hugsa vit okkum, at tú áður hevur arbeitt við eitt nú PL1, CICS og DB2.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at seta seg í samband við Sámal Samuelsen, tlf. 345 108. T-postur: samals@elektron.fo.

## UMSÓKNARFREIST

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagið á middegi mánadagin 7. januar 2008. Send umsóknina til P/f Elektron, Staravegur 9, Postboks 3219, FO-110 Tórshavn, att: Ulla Joensen. Ella við telduposti til ulla@elektron.fo.

Stephanssons Hús

P/f Elektron er millum landsins størstu veitarar av KT-tænastum til fíggjarfyritøkur, almennar stovnar og vinnuvirkir. Umframt at menna skipanarloysnir, veita vit tænastur innan infrastruktur og ymiskar hostingloysnir.
Visiónin er, at okkara skipanar- og tænastuveitingar hava við sær, at kundin kann fremja framúr avrik á sínum virkisøki, samstundis sum trygdin og rakstrarstøðufesti eru í topp. 90 fólk starvast hjá P/f Elektron.

Elektron

# Starvsfólk til Telebúðina í Tórshavn

*„Eingin framtíð er í starvinum, framtíðin er í starvsfólkinum"*

- George Crane -



Telebúðin í Tórshavn er ein av seks Telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar.
Til handilin í Tórshavn søkja vit eftir einum starvsfólki, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at fáa eina góða tænastu. Til rætta fólkið hava vit eitt sera spennandi starv við avbjóðandi uppgávum og ymiskum ágóðum.

**Til starvið ynskja vit eitt fólk við:**
Handilsroyndum og royndum at avgreiða kundar

- hug og førleika til kundatænastu
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva í toymi og við ymiskar starvsfólkabólkar
- ídni at røkka ásettum málum
- kunnleika til enskt
- vilja at hjálpa, har tað er neyðugt
- evnum at arbeiða og avgreiða mál skjótt
- viðkomandi útbúgving, men hetta er tó ikki ein treyt.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Telebúðin í Tórshavn er opin allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Svannu F. Kjær, skj@ft.fo ella Starvsfólkadeildina á tel 303030.

Umsóknir skulu vera FøroyaTele í hendi í seinasta lagi hósdagin 27. desember 2007, og tær skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
starvsfolkadeildin@ft.fo

FT Samskifti er dóttirfelag í Føroya Tele. Í nýggja felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarútgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. Broytingin til nýggja dóttirfelagið er við til at tryggja eins treytir fyri kappingarneytarnar á marknaðinum. Hesir nýggju karmarnir geva nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Í felagnum starvast 105 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*